# FCA í málríkum dysti

Todi Jónsson og FC Amager eru langt síðan farin undir fyrireikingar til komandi kappingarár. Onkrar skiftingar hava verið í hópinum, og venjingardystir fylla alsamt meira í ætlanunum komandi vikurnar. Leygardagin royndi FC Amager seg ímóti Brønshøj. Hans Jørgensen, Erling Jacobsen og Páll Klettskarð royna seg allir í føroysku kappingini í løtuni, og teir vóru tískil ikki við í hópinum. Úrslitið gjørdist 4-4. Daniel Udsen, Mohammed Abdalas, Jacob Josephsen og Alhagie B. Nije stóðu fyri málunum hjá FC Amager.

# Atli á blettinum

Atli Danielsen skoraði einsamalla málið hjá Frem í venjingardystinum ímóti Sønderjyske leygardagin. Landsliðsleikarin legði gestirnar á odda við vøkrum beinleiðis frísparki, tá seinni hálvleikur var hálvrunnin. Eisini Jón Rói Jacobsen var í verjuni hjá Frem, og heimasíðan hjá felagnum sigur, at hann var besti maður hjá Frem hendan dagin. Komandi venjingardystur hjá Frem er ímóti Toda Jónsson og FC Amager.




*Undan sjálvari finaluni er støðan tann, at Ormurin og Havnarbáturin hava sama stigatal. Tann av hesum báðum, sum verður fremri á ólavsøku, verður meistari. Tað ber ikki til at ímynda sær, at spenningurin skal verða størri eftir seks kappingar, enn hann nú er tað*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tað er lagt upp til sanna finalu

**Kappróðurin á vestanstevnu gekk ógvuliga skjótt og væl, og úrslitini lagaðu seg soleiðis, at kappingin millum 10-mannaførini verður avgjørd í sannari finalu á ólavsøku**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað mundi kjálkast fram ímóti meti, tá ið kappróðurin á vestanstevnu var á skránni leygardagin. Sjáldan man tað hava gingið so skjótt og væl at avgreiða róðrarnar, sum tað gjørdi á vánni í Miðvági.

Klokkan trý brast fyrsta startskotið í FM kappingini. Tá vóru væl eydnaðu barnaróðrarnir longu avgreiddir, og tá ið klokkan var hálvgum fimm, vóru 10-mannaførini longu farin um málið.

Kilometurin, sum tað varð kappast á, var innanfyri stóra grótkasti í Miðvági. Startdómarin hevði samband við grótkastið, tað var summarveður á vánni, og umstøðurnar hjá áskoðarunum, sum ongantíð høvdu høvi at keða seg, vóru góðar at fylgja við.

## Fyrsti meistarin funnin

Í fleiri kappingum eru meistararnir so at siga funnir. Men tað er bara í kappingini millum 8-mannaførini, at støðan er soleiðis, at róðurin á ólavsøku einki hevur at siga fyri, hvør verður meistari.

Heiðabáturin vann á vestanstevnu. Munurin aftur til kappingarneytarnar var ikki so stórur, sum hann hevur verið fyrr í ár, men tað løgdu teir í gula bátinum vertin á. Sigurin og tað, at tað hesa ferð var Argjabáturin og ikki Árnfirðingur, sum var næstfyrstur, ber við sær, at stigamunurin er so mikið stórur, at eingin kann røkka Heiðabátinum. Uttan mun til hvussu tað fer at hilnast á ólavsøku.

Tá ið bilarnir komu aftur á Glyvrar tíðliga leygarkvøldið var fýrverk og móttøka eftir at bilarnir høvdu verið runt í kommununi og víst bátin fram.

Jarnbardur vann kappingina millum 6-mannafør við kvinnum. Luttakararnir eru fáir í hesi kappingini. Tað ber við sær, at Jarnbardur verður meistari, um hann kemur á mál á ólavsøku, og hví skuldi hann ikki tað?

Sílið við kvinnum og Sílið við dreingjum kunnu illa sleppa undan at verða meistarar. Drekin við gentum er heilt væl fyri, og tað er Sundabáturin eisini, hóast tað heldur ikki hesa ferð eydnaðist 6-mannafarinum úr Norðdepli og Hvannasundi at vinna.

## Finalan

Stóra finalan í FM kappróðrinum í ár verður, tá ið 10-mannaførini fara at rógva um tvær vikur. Undan sjálvari finaluni er støðan tann, at Ormurin og Havnarbáturin hava sama stigatal. Tann av hesum báðum, sum verður fremri á ólavsøku, verður meistari. Tað ber ikki til at ímynda sær, at spenningurin skal verða størri eftir seks kappingar, enn hann nú er tað.

Havnarbáturin hevur vunnið tvær tær seinastu ferðirnar, og tí kann ikki annað sigast, enn at teir á Havnarbátinum mugu finna seg í at vera favorittar. Men talan er um so mikið tætta kapping, at tað væl kunnu vera teir heilt smáu lutirnir, sum fara at gera av, um tað verður tann hvíti ella tann blái báturin, sum verður meistari.

Sum tað nú so ofta verður tikið til: Tað verður tann, sum rakar dagin, ið fer at vinna!

# Sagt í 3. hálvleiki

**Ein partur av triðja hálvleiki á Rás2 eru SMS-boð frá lurtarunum. Í tann mun at tíðin røkkur, verða hesi boð lisin upp í sendingini. Og bestu SMS'ini verða eisini prentað í mánadagsútgávuni av Sosialinum**

»Svangaskard kann eita sjàlvtøkubordi!! Ein skuffadur toftamadur:-(«

»Ovari vøllur kundi iti Animal farm, har eru ju bædi løvur og tikarir pluss apur:-)«

»Gundadalur kundi fingi navni Cirkus Arena. Ti har eru bara klovnir id spæla.«

»Haldi hatta arena hja ki vera raduliga bygdasligt. O voni ikki, at nakar i havn finnur uppa nakad liknandi!«

»Gundadalur er ikki til sølu«

»Heimavøllurin hja Ransin, er Arena Skansin:-) Haha...«

»Men shit b71 leikarnir eru lekkrir! Eitt nytilsi at siggja bædi gott spæl og lekkrar dreingir. Gudmund er tu eisini forlovadur?»

»Hbari snakkar um gummibein... forbarmi seg. Hevur hann ikki hugt eftir hb...teir spæla sum um teir hava 22 træbein hvønn dyst.«

»Nu er tad eftirhondini hvørt vikuskifti, at man skal hoyra leikarir og venjarar persònliga utspilla dòmarir, um teir kanska hava havt ein minni godan da. Skuldu vit ikki kanska venda øllum a høvdi, og byrja at spilla leikarir ut aftana vanaligt avrik. Teir kalla seg framvegis amatørar, men allir faa teist. Forrestin... Hvar eru pjotr og baggi` meir enn eina vanliga arbeidsmannaløn!! Domarir skuldu fingid tad dubulta, fyri at hoyra uppa hasar gratikonirnar. Dòmarafan.«

»KI komid i nidurflytingarvanda sidan navn kom a leikvøllin, betur einki navn og spala sum vikingur«

»Nu ma taxamadurin handla, um vit skulu hava nakran kjans til medaljur.. Skift venjara og styrk lidi, annars endar tad sum sirkus arena.«

»Leikarnir ùr KI farnir ì feriu? 11 statistar ì fuglaf!«

»KI mangla bara stig, framgongdin er at hòma i spælinum. Fai Allan Joensen i form, hann er klassi enn. Keep up the good work Eydun«